

## Ert tú okkara smílandi rødd?

Sum móttøkufólk hjá okkum, skalt tú vera við til at tryggja, at ALS framhaldandi verður eitt sera gott og mennandi arbeiðspláss, sum leggur stóran dent á, at starvsfólk og brúkarar kenna seg væl og trívast. Okkara arbeiðsumhvørvi er dynamiskt og positivt eins og tú.

Vit sóknast eftir einum móttøkufólki, sum kann røkja nógvar arbeiðsuppgávur. Tú verður ein lyklapersónur hjá okkum, sum er okkara rødd og andlitið yvirfyri brúkarunum, men sum eisini hevur dagligt samskifti við øll starvsfólkini á stovninum. Tú kemur at samstarva tætt við verandi móttøkufólki.

ALS er kent sum ein vælvirkandi stovnur, sum hevur skjóta og dygga málsviðgerð. Tú ert ein avgerandi liður í at tryggja hetta, tí tínar uppgávur eru millum annað at taka ímóti posti, at umsita journalskipanina og at taka ímóti brúkarum – bæði um telefonina og í móttøkuni. Tú ert fyrsta andlitið og røddin, brúkararnir møta, og tí er ógvuliga umráðandi, at tú ert blíð/ur, fyrikomandi og dugir væl at tosa við fólk.

Tú skalt eisini vera nærlagdur/løgd og ábyrgdarfull/ur og duga at hava yvirlit yvir nógv í senn. Tað er ein fyrimunur, um tú er vanur/von við ella hevur evnir at samskifta og veita góða tænastu, til dømis frá handilsarbeiði, umsiting ella skrivstovu. Men vit sóknast eins nógv eftir persónligum eginleikum.

Umframt arbeiðsloysisstuðul umsitur ALS eisini Barsilsskipanina.

Løn sambært avtalu.

Umsóknarfreistin er 12. november 2007. Umsóknir skulu stílast til Mourits Joensen, deildarleiðara á ALS, sum fegin sigur tær meira um starvið á tel 349550 ella teldupost mourits@als.fo

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Faks 349551
als@als.fo • www.als.fo




# STÓRT
# BILBLAÐ
## í Sosialinum

Mikudagin 31. oktober
verður stórt serblað
ÓKEYPIS í Sosialinum